# Gjald fyri summar- og feriulegur

**/ sí áseting í sáttmálanum.**
Felagið fær nógvar fyrispurningar um løn og eykaviðbót , tá limirnir fara á summar- og feriulegur. Tað vísir seg ofta, at greinin í sáttmálanum um summar- og feriulegur verður tulkað ymiskt og ofta misskild.

Felagið skal tí hervið útgreina, hvussu greinin skal umsitast og skiljast:

- Løn undir leguni.
- Løn verður latin fyri 8 tímar fyri hvønn byrjaðan legudag. - Viðmerkjast skal, at øll starvsfólk, sum eru við á leguni, fáa løn fyri 8 tímar, eisini tey, sum vanliga arbeiða niðursetta tíð.
- Leguviðbótin er fyri hvønn byrjaðan legudag kvøldviðbót fyri 16 tímar, - Kvøldviðbótin er pr. 1.10.2016 kr. 26,40
- Um legan fellur á leygar- sunnu- og halgidagar ella ein serstakan frídag, er viðbótin tann dupulta.
- Viðmerkjast skal, at tann tíðin, ein er til arbeiðis, áðrenn farið verður á legu, og tá ein kemur aftur av legu, er at rokna sum eyka arbeiðstíð út yvir 8 tíma dag, tvs. at um:

**farið verður á legu**
- ein týsdag kl. 10.00, og starvsfólkini møta kl. 8.00, gevur hetta 2 eyka yvirtímar (2 x 1,5) = 3 tímar

**komið verður aftur av legu**
- fríggjadag kl. 13.00, og farið verður heim kl. 16.00, gevur hetta 3 eyka yvirtímar (3 x 1,5) = 4,5 tímar